# HANDILSVINNUFELAGIÐ

## ÁRSFRÁGREIÐING

## 2021



## INNIHALDSYVIRLIT

Frágreiðing frá nevndini ........ 2
Endamál felagsins ........ 5
Nevndin í Handilsvinnufelagnum ........ 6
Limatal í Handilsvinnufelagnum ........ 6
Limagjald í Handilsvinnufelagnum ........ 7
Árið ið fór ........ 8
Vit sum handla ........ 8
Heimleiðistiltøk ........ 10
Handilsvinnan hittir miðnámsskúlanæmingar ........ 10
Merkantilu útbúgvingarnar ........ 14
Havnar Detailhandlarafelag ........ 14
Føroyska detailhandlarasøgan ........ 15
Smápakkar úr Kina ........ 15
Atgongd til akfarsskránna ........ 15
Pantskipan á einnýtisíløt ........ 16
Nýggjar reglur um vakmyndatól ........ 16
Støðan nú og frameftir ........ 17
Viðtøkur ........ 18
Viðtøkur handilsvinnufelagsins ........ 18



# Frágreiðing frá nevndini

Handilsvinnufelagið er sett saman av einum fjølbroyttum limaskara. Áhugamálini vit arbeiða innanfyri eru sostatt sera ymisk, eisini landafrøðiliga.

Tí ber ikki til at lýsa gongdina og støðuna í Handilsvinnuni yvir ein kamb. Ein partur at handilsvinnuni hevur tað gott, men tað eru eisini onnur, ið hava tað minni gott.

Tað eru fleiri orsøkir til hesa støðuna og Korona er ein av teimum.

Vit hava øll verið sera nógv merkt av koronafarsóttini. Fyri fleiri okkara hevur farna tíðin, aftaná fyrstu koronabylgjuna, verið góð, um hugsað verður um søluna, men nógvar avbjóðingar hava eisini verið knýttar at broyttu fortreytunum. Vit hava ikki kunnað havt ein vanligan gerandisdag, men hava alla tíðina, sum øll onnur, skulu tillaga okkum broytt viðurskifti. Tað hevur verið neyðugt at taka nógv atlit fyri at gera tað so trygt sum gjørligt, bæði hjá viðskiftafólki og hjá starvsfólki.

Tað hevur verið trupult við stongdum barnaansingarstovnum, sóttarhaldi o.l.

Handlar, ið selja klæðir, máling, leikur, vørur til heimi o.l., eru handlar, sum hava verið væl vitjaðir, tí nógv fólk hava havt meira tíð heima og hava heldur ikki verið uttanlands. Aðrir limir, t.d. teir, ið selja til vinnulívið, hava í nógvum førum havt verri umstøður. Vit hava eisini bilútleigarar sum limir, og har hevur verið stór niðurgongd. Tí ber ikki til at siga antin ella.

Tað eru eisini økir, sum hava havt avbjóðingar við at fáa vørur frá veitarum, tí hesir hava verið hart raktir av Korona og framleiðslur hava verið stongdar niður. Avleiðingarnar síggjast nú sum hækkandi prísir, orsakað av høgu flutningsútreiðslum úr t.d. Asiu, har stórur partur av vørunum verða framleiddar. Vit síggja veitarar, har flutningsútreiðslurnar úr Asia til Evropa eru øktar 500%, og hetta fer at síggjast aftur í øktum prísum í 2021.

Tí fara vit at merkja avleiðingarnar av Korona langt inn í 2021.

Enn hava vit ikki merkt somu avleiðingarnar av Korona, sum í grannalondum okkara, har fyritøkur hava verið noyddar at snara lykilin um. Korona hevur ikki læst samfelag og handilslív okkara niður á sama hátt sum flest aðrastaðni. Men sum nevnt, so er føroyska handilsvinnan sera fjølbroytt, og tí er ójavnt, hvussu støðan er.

Handilsvinnufelagið arbeiðir støðugt við at menna og styrkja føroysku handilsvinnuna.

Í nógv ár hava vit sæð eitt rák í Føroyum, har tað ikki hevur verið sæð eins fínt at fara í læru sum at fara í skúla. Hetta hevur handilsvinnan eisini verið rakt av við manglandi virðing fyri handilsfakinum. Hetta hava vit roynt at gjørt nakað við saman við øðrum lærlingavinnum, og nú sær út til at vend er komin í. Nú sær eisini út til at vera í fínasta lagi at fáa sær útbúgving við at fara í læru. Fyri okkum í handilsvinnuni, sýnist broytingin at vera komin í seinastu fáa árini, og vit arbeiða støðugt við at skapa áhuga fyri handilsvinnuni sum læropláss.

Tilgongdin av lærlingum hevur verið jøvn hesi seinastu árini. Tøl frá Yrkisdeplinum vísa, at nú eru fleiri, sum byrja í handilslæru. Hesi seinastu árini hevur árliga tilgongdin av lærlingum ligið omanfyri 60, samanborið við góð 40, um vit hyggja 7 til 10 ár aftur í tíðina.

Handilsvinnan er ein stór vinna við nógvum starvsfólkum, og handilsvinnan ynskir tí at fáa fleiri lærlingar og harvið fleiri yrkislærd. Tørvandi ansingarmøguleikar er tó ein avbjóðing, sum kann fáa fólk at velja handilsyrkið frá, tí við verandi ansingartilboðum kann tað vera ein avbjóðing at arbeiða til kl. 17:30, sum er vanlig afturlatingartíð hjá nógvum handlum.

Handilsvinnufelagið hevur framt ymisk átøk, fyri at fáa fleiri at velja handilsvinnuna sum yrkisleið. Tað nýggjasta átakið er "Vit sum handla", ið hevur verið væl móttikið. Vit hava týðiliga sæð ein øktan áhuga við fleiri fyrispurningum í kjalarvørrinum av hesum átakinum.

Handilsvinnufelagið hevur harumframt havt árligt tiltak á Glasi, har handilsvinnan hevur vitjað og greitt næmingunum nærri frá handilsvinnuni sum starvsøki og starvsleið. Í ár var tiltakið, fyri fyrstu ferð, eisini fyriskipað á Kambsdali. Í 2020 vórðu hesi tiltøkini, sum so nógv annað, avlýst vegna Korona.

Handilsvinnufelagið hevur eisini verið til onnur tiltøk fyri at lýsa handilsvinnuna sum yrikisleið, t.d. tiltakið "Greið frá tínum yrki". Annars royna vit at vera sjónlig á sosialu miðlunum við jøvnum millumbilum. Átakið "Vit sum handla" verður t.d. at síggja vikuliga á sosialu miðlunum komandi árið.

Í tí stóra og heila er handilsvinnan nøgd við karmarnar, handilsvinnan fær at virka innanfyri. Tað, sum ræður um hjá okkum, er at hava somu karmar at virka innanfyri, sum útlendskar fyri tøkur, ið selja til føroyskar kundar, hava.

Føroyska handilsvinnan verður javnan samanborin við, hvat vørur kosta í Danmark. Tað eru nøkur viðurskifti, ið stilla okkum øðrvísi enn tilsvarandi handlar í Danmark. Í Føroyum skal ofta rindast Gatt-tollur umframt flutningsútreiðslur av vørunum, ið verða seldar um føroysku handilsdiskarnar. Hetta hevur við sær, at um føroyskir handlar selja vørur fyri danskar prísir, so er vinningurin hjá føroyska handlinum lægri, enn hjá danska handlinum, ið selur somu vøru. Harumframt er føroyski marknaðurin lítil, og tí ber ofta ikki til at keypa inn í nóg stórum mongdum, sum kunnu geva betri innkeypsprísir.

Útlendskir nethandlar skapa stórar avbjóðingar fyri føroyskar handlar. Sambært tølum frá Taks, so koma 8.000 sokallaðir Kinapakkar til Føroyar um vikuna. Allir netpakkar, sum hava eitt virðið undir 300 kr., sleppa inn í landið toll og MVG frítt. Hetta er stak kappingaravlagandi fyri okkum, sum dríva virksemi í Føroyum. Vit skulu avrokna MVG og toll av allari upphæddini, og vit hava tí ikki somu treytir sum útlendsku nethandlarnir, ið sleppa undan avgjøldum upp til 300 kr.

Vaksandi nethandilin frá útlandinum hevur stóra ávirkan. Hyggja vit uttan um okkum, t.d. til Danmarkar og Norra, so sæst eitt týðuligt rák, har tað vera færri og færri spesialhandlar, serliga á minnu plássunum. Eisini í Føroyum eru væl færri handlar í dag enn fyri 20 árum síðan. Heldur henda gongdin fram, so fer talið av handlum í Føroyum framhaldandi at minka og vøruúrvalið tilsvarandi. Tað er ein avbjóðing at reka smáar spesialhandlar, og tað verða færri og færri av teimum. Hvussu hetta verður frameftir, stendur upp til politisku skipanina og keypsmynstri hjá fólki.

Handilsvinnufelagið arbeiðir støðugt við at betra og menna karmarnar um føroysku handilsvinnuna. Mest átrokandi, beint nú, er at fáa lóggávuna um netpakkar broytta, soleiðis at føroyska handlarnir ikki eru verri stillaðir í kappingini enn t.d. Amazon, Alibaba og aðrir altjóða nethandlar. Sum føroyska lóggávan er í dag, so fáa slíkir risastórir nethandlar fyrimun fram um føroyskar handlar frá føroysku myndugleikunum.

Politiska skipanin vísir ongan áhuga fyri at taka hetta málið upp, hóast vit hava gjørt vart við hetta í fleiri umførum og yvir fleiri ár. Tað liggja fleiri greinar á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum um júst hetta,

har eisini víst verður á, hvussu nógvar inntøkur landskassin missir í tolli og MVG av hesi kappingar-avlagandi skipanini fyri føroyska vinnu.

Handilsvinnufelagið fylgir annars væl við lógum og reglum sum kunnu ávirka virksemið í føroysku handilsvinnuni. Lógin um at geva bensinstøðunum talgilda atgongd til akfarsskránna á Akstovuni er avgreitt og nýggju reglurnar um vakmyndatól eru eisini tillagaðar viðmerkingarnar frá Handilsvinnu-felagnum. Handilsvinnufelagið valdi í desember 2019 tvey umboð í arbeiðsbólk at fyrireika eina nýggja pantskipan til einnýtisítløt, men bíða verður framvegis eftir fundarboðum úr Umhvørvis- og vinnu-málarráðnum.

Árið, ið fór, var sum sagt nógv ávirkað av, at koronatiltøkini læstu stórar partar av samfelagnum niður. Tað eydnaðist at halda eitt heimleiðistiltak við Mads Hvidved Grand, fyrrverandi samskiftis-stjóra í Salling Group, eftir at tvær tær fyrstu koronabylgjurnar høvdu lagt seg.

Handilsvinnufelagið er so smátt farið í holt við at seta tiltøk á skránna aftur.

Eisini hevur Handilsvinnufelagið nýliga gjørt avtalu við rithøvund, um at skriva bók um føroysku detailhandlarasøguna. Bókin kemur væntandi út á heysti 2022.

Tórshavn, tann 22. apríl 2021

Eyðvør Berg
forkvinna



# Endamál felagsins

Handilsvinnufelagið er vinnugreinafelag, ið umboðar seráhugamálini hjá føroysku handilsvinnuni.

Limirnir í handilsvinnufelagnum eru framleiðslufyritøkur, heilsølur og vanligir handlar, ið selja alt frá knappanálum, góðgæti, matvørum, klæðum, teldum, maskinum, byggitilfari til tænastuveitingar av ymsum slag.

Handilsvinnufelagið er sostatt meginfelag fyri allar føroyskar handilsfyritøkur, sum selja eitt ella annað, líka mikið um tað eru vørur ella tænastur.

Tað eru serliga fyritøkur, ið virka á føroyska heimamarknaðinum, ið eru limir í Handilsvinnufelagnum.

Handilsvinnufelagið strembar eftir at veita limum sínum best møguliga tænastu.

Málið hjá Handilsvinnufelagnum er at menna og styrkja føroyska handilsvinnu sambært raðfestingunum, sum limirnir í Handilsvinnufelagnum seta á skránna, og tað eru tí limirnir í Handilsvinnufelagnum, ið gera av, hvussu felagið skal ávirka gongdina og menningina av føroyskari handilsvinnu.

Menningin av handilsvinnuni snýr seg m.a. um at vísa á týdningin av handilsvinnuni, soleiðis at fleiri fáa áhuga í at velja handilsvinnuna sum sína yrkisleið.

Hetta verður gjørt umvegis kunningar- og skeiðsvirksemi, men Handilsvinnufelagið er eisini virkin partur í tilgongdini at menna og ávirka úbúgvingarskipanina fyri føroyska handilsvinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Handilsvinnufelagnum er at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum, soleiðis at føroysk handilsvinna fær best møguligar karmar at virka innanfyri.

Hetta ger Handilsvinnufelagið m.a. við viðmerkingum um støðu sína, tá ið lógir og reglur, sum kunnu ávirka limirnar í Handilsvinnufelagnum, verða fyrireikaðar.

Handilsvinnufelagið heldur eisini eitt vakið eyga við galdandi lógum og reglum fyri limir sínar. Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at føroysk handilsvinna hevur kappingarførar og smidligar karmar at virka innanfyri.

## Nevndin í Handilsvinnufelagnum

Eyðvør Berg, forkvinna
Regin W. Dalsgaard, næstformaður
Gunnar Mohr, nevndarlimur
Áki V. Poulsen, nevndarlimur
Bergur D. Jensen, nevndarlimur

Bjarni Bogason, tiltakslimur



*Frá vinstru: Bergur D. Jensen, Regin W. Dalsgaard, Eyðvør Berg, Gunnar Mohr og Áki V. Poulsen*

## Limatal í Handilsvinnufelagnum

Í løtuni eru 61 limir í Handilsvinnufelagnum.

Gongdin í limatalinum í Handilsvinnufelagnum frá 2012 til 2021 sæst á myndini niðanfyri.



## Limagjald í Handilsvinnufelagnum

Limagjaldið í Handilsvinnufelagnum er ásett eftir, hvussu nógv ársverk eru í viðkomandi handilsfyritøku, sí talvuna niðanfyri.

| **Ársverk** | **Árligt limagjald** | **Mánaðarligt limagjald** |
|---|---|---|
| 1-3 | 1.200 kr. | 100 kr. |
| 4-10 | 2.400 kr. | 200 kr. |
| 11-20 | 3.600 kr. | 300 kr. |
| 21-50 | 4.800 kr. | 400 kr. |
| 51- | 6.000 kr. | 500 kr. |



# Árið ið fór

Tá koronatilmælini læstu stórar partar av føroyska samfelagnum niður, beint eftir grækarismessu 2020, valdaði stór óvissa í handilsvinnuni, hvussu avleiðingarnar av koronatiltøkunum fóru at ávirka heimliga eftirspurningin.

Ferðavinnan merkti sviðan at tiltøkunum alt fyri eitt, og føroysku ferðaskrivstovurnar vóru noyddar at venda kundunum í hurðini, tí nú bar ikki til at fara av landinum at ferðast.




Fyrsta tíðin við koronatiltøkum var eisini ørkymlandi fyri handilsvinnuna, men tað tók tó ikki langa tíð hjá handilsvinnuni at tillaga seg broyttu umstøðurnar, og føroyska handilsvinnan hevur tí kunnað havt opið fyri kundar sínar, undir mest sum allari koronakreppuni. Hetta hevur bert latið seg gjørt við felags forstáilsi millum kundar og handlar, har øll hava gjørt sítt fyri at forða smittuni at spjaða seg.

Ein partur av pengunum, ið føroyingar høvdu sett av at ferðast fyri uttanlands, vísir seg ístaðin at vera brúktur í heimligu handilsvinnuni. Tað sæst m.a. aftur við nógv øktari sølu av byggitilfari, húsbúnaði, klæðum umframt vanligum gerandisvørum.

Farna árið hevur sostatt verið eitt gott ár fyri føroyska handilsvinnu við framhaldandi vøkstri í søluni. Føroyska handilsvinnan hevur tí framvegis somu avbjóðingar við at útvega arbeiðsmegi, sum tíðina, fyri koronakreppuna, tá bráðtørvurin á arbeiðsmegi var ein tann størsta avmarkingin fyri framhaldandi vøkstri.

Tað eru týðiligar ábendingar um, at koronatíðin hevur sett ferð á menningina av føroyskum nethandli. Her er tað tó ein stórur trupulleiki, at føroysku nethandlarnir líða undir ójavnari kapping frá útlendsku nethandlunum á føroyska marknaðinum, tí útlendskir nethandlar fáa fíggjarligan stuðul umvegis landskassan at virka á føroyska marknaðinum í kapping við føroyskar nethandlar.

Samanborið við onnur lond, so hevur føroyska samfelagið higartil klárað seg fyrimyndarliga gjøgnum koronakreppuna. Hetta hava allir føroyingar verið felags um. Vit hava havt tamarhald á smittuni og megnað at fingið smittutølini niður, hvørja ferð smittan hevur havt hug at gera um seg aftur.

Koronatilmælini hava ávirkað virksemið hjá Handilsvinnufelagnum á tann hátt, at fleiri tiltøk fyribils vórðu útsett. Felagið er í gongd við at fáa tiltøkini á skránna aftur. Niðanfyri verður greitt nærri frá ymsum tiltøkum og viðurskiftum hjá Handilsvinnufelagnum.

## Vit sum handla

Handilsvinnufelagið fór í 2019 undir eina tilgongd at branda handilsvinnuna, so hon gerst meira sjónlig í samfelagnum og kemur á radaran hjá teimum ungu, tá ið tey skulu velja yrkisleið.




Hetta verður gjørt við átakinum “Vit sum handla”

Handilsvinnan hevur tørv á, at fleiri velja eina yrkisleið í handilsvinnuni, og endamálið við “Vit sum handla” átakinum er at vekja áhugan hjá teimum ungu at leita sær, ikki bara eitt starv, men eisini eina yrkisleið innan handilsvinnuna.

“Vit sum handla” átakið ger vart við, at tað eru aðrir møguleikar fyri tey ungu enn bókliga leiðin. Bókliga leiðin verður ofta lýst sum tað einasta rætta fyri tey, sum hava mál og ætlanir við lívinum.

Tað eru tó ikki øll, sum trívast í tí umhvørvinum, og “Vit sum handla” vísir á, at ein yrkisleið í handilsvinnuni eins væl kann verða rætta leiðin til eina góða framtíð, serliga fyri tey, sum handla.

Ein pakki við grafiskum tilfari til bæði prent og on-line nýtslu er tøkur hjá limunum í Handilsvinnufelagnum. Handilsvinnufelagið fer at mæla limum sínum til at brúka hetta tilfarið, sum er tíðarleyst.

Grafiska tilfarið kann brúkast, tá ið søkt verður eftir fólki, ella tá ið ljós skal varpast á handilsvinnuna, og tað fer Handilsvinnufelagið at halda fram við.



Handilsvinnufelagið hevur latið framleitt nakrar stuttfilmar, sum hava verið vístir á Facebook bólkinum “Vit sum handla”.

Gjørdir vórðu nýggju filmar, áðrenn koronatilmælini steðgaðu framleiðsluni av tíggjunda filminum.

Mest sæddi filmurin á Facebook bólkinum, var sæddur meira enn 39.000 ferðir, og mest dámdi filmurin, varð dámdur meira enn 1.300 ferðir.

Beint fyri páskir í ár fór Handilsvinnufelagið aftur í holt við eitt nýtt tiltak undir átakinum “Vit sum handla” á sosialu miðlunum.

Ætlanin er at leggja ein post út um vikuna á Facebook og Instagram hetta komandi árið.

Endamálið er at vekja áhugan og eggja teimum unga at velja handilsvinnuna sum yrkisleið.

## Heimleiðistiltøk

Handilsvinnufelagið hevði nøkur heimleiðistiltøk á skránni, tá koronatilmælini avmarkaðu møguleikarnar fyri at halda slík tiltøk. Nøkur tiltøk vóru útsett og okkurt tiltak er eisini avlýst.

Heimleiðistiltakið við Mads Hvidved Grand, fyrrverandi samskiftisstjóri í Salling Group, við heitinum "Hvussu verður gamalt brand flutt í nýggjan veruleika" varð flutt frá apríl til september, tá tað eydnaðist at halda tiltakið á Hotel Hilton Garden Inn.

Fyrilesturin hjá Mads Hvidved Grand, snúði seg um største handilssamtakið á danska smásølumarknaðinum, sum í 2018 skifti navn og samleika frá *Dansk Supermarked* til *Salling Group*.

Handilssamtakið skuldi nú marknaðarførast við einum nýggjum og øðrvísi brandi, sum var væl og virðiliga fyrireika frammanundan, men bar tað yvirhøvur til at broyta fatanina av einum so kjølfestum brandi, sum Dansk Supermarked var? Hvussu varð hetta gjørt? Og hevur tað yvirhøvur verið stríðið vert?



Fyrilesturin varð hildin samsvarandi galdandi koronatilmælum á Hotel Hilton Garden Inn, hósdagin tann 24. september.

Í mai var ein fyrilestur á skránni við Guðrið Højgaard, stjóra í Visit Faroe Islands, har hon skuldi greiða frá, hvørjar møguleikar føroysk handilsvinna hevur at fáa meira burtur úr nógvu fremmandu ferðafólkunum, sum vitja landið.

Fyrilesturin við Guðrið Højgaard er fyribils útsettur, men ætlanin er at fáa ein fyrilestur við henni á skránna aftur í Handilsvinnufelagnum.

Koronafarsóttin hótti aftur við at gera um seg móti endanum av 2020, og tí vórðu onkur tiltøk útsett enn einaferð. Næsta heimleiðistiltakið í Handilsvinnufelagum verður eitt GDPR tiltak til handilsvinnuna. Tað verður Hans Christian Olsen, sum kemur at halda tiltakið. Á hesum tiltakinum er eisini ætlanin at fáa Eiler Fagraklett at halda ein fyrilestur um marknaðarføring í Føroyum upp gjøgnum tíðina.

Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at Vinnuhúsið hevur havt fimm stroymaði GDPR tiltøk, saman við Dátueftirlitinum, runt um í landinum, men hetta tiltakið í Handilsvinnufelagnum, við Jens Christian Olsen, verður skraddara seymað til handilsvinnuna.

## Handilsvinnan hittir miðnámsskúlanæmingar

Vitjanirnar á Glasi og á Kambsdali vórðu avlýstar í fjør, men í ár eydnaðist tað so handilsvinnuni at hitta miðnámsskúlanæmingarnar á Glasi og á Kambsdali.

Vitjanin á Glasi var mikudagin 14. apríl, og vitjanin á Kambsdali var mánadagin 19. apríl.

Hesar fyritøkurnar vóru við til vitjanirnar í ár:

- Berglon
- Borg
- Bygma
- Kemilux
- Krosstein
- Rit & Rák
- Solar

Frá skúlunum vóru næmingar á FHS, næmingar á triðja ári á Búskaparbreytini, umframt næmingar á fyrireikingarbreytini (HF).

Á skránni vóru nakrar styttri framløgur, og næmingarnir fingu møguleiki at tosa við luttakandi fyritøkurnar.











KEMILUX
Einar reinari Føroyar











Endamálið við hesum tiltøkunum er at kunna og eggja tey ungu at taka yrkislærda vegin.

Luttakandi fyritøkurnar fingu møguleika at heilsa upp á tey ungu, lurta eftir teirra ynskjum og greiða frá, hvat eitt arbeiði í teirra fyritøku fevnir um, og hvørjar møguleikar tey hava, um tey velja handil sum yrki.

Næsta ár er ætlanin at hava hesi tiltøkini á Glasi og Kambsdali í februar ella mars.

## Merkantilu útbúgvingarnar

Handilsvinnan er ikki nøgd við føroysku handilsútbúgvingina ella merkantilu útbúgvingarnar sum er. Handilsútbúgvingin er ov lítið praktisk, og fleiri handilslærlingar hava eina fatan av, at teir taka FHS umaftur.

Handilslærlingar mangla tí veruligar avbjóðingar við verkætlanum í síni útbúgving.

Handilsvinnufelagið er umboðað í Yrkisútbúgvingarráðnum, og Yrkisútbúgvinarráðið hevur latið politisku skipanini tilmæli, har mælt verður til at fáa eina betri kobling millum teori og praksis í merkantilu útbúgvingunum.

Tað er neyðugt at gera broytingar í faksamansetiningini og undirvísingarháttinum, sum skal vera meira case grundað.

Broytingarnar kunnu hava við sær, at skúlagongdin fer at fara frá 7 vikum samlað til 9-10 vikur.

Tilmælt verður t.d., at skúlagongdin endar við uppgávu. Ikki sum í dag, har tað kemur fyri, at uppgávan skal skrivast fleiri mánaðir eftir lokna skúlagongd, tí kravt verður, at uppgávan skal skrivast í seinasta partinum av útbúgvingini.

Einki er hent síðan Yrkisútbúgvingarráðið lat politisku skipanin síni tilmæli, men hesa tíðina eru broytingar gjørdar í donsku útbúgvingarskipanini, sum kunnu hava avleiðingar fyri handilslærlingar, ið ætla til Danmarkar at taka skúlan.

Yrkisútbúgvingarráðið hevur tí biðið um at fáa síni tilmæli aftur úr politisku skipanini, soleiðis at neyðugar broytingar kunnu gerast í tilmælunum frá Yrkisútbúgvingaarráðnum hesum viðvíkjandi. Handilsvinnufelagið hevur samstundis heitt á limir sínar, um at seta seg í samband við Yrkisdepilin, áðrenn lærlingasáttmálar verða undirskrivaðir við lærlingar, sum skulu til Danmarkar at taka skúlan.

## Havnar Detailhandlarafelag

Handilsvinnufelagið fekk í fjør tilboð um at yvirtaka Havnar Detailhandlarafelag. Havnar Detailhandlarafelag hevur ikki verið virkið síðan í seinnu helvt av 1980-árunum, men endamálið við Havnar Detailhandlarafelag fellir inn undir endamálið hjá Handilsvinnufelagnum, sum fevnir um alt landið.




Handilsvinnufelagið hevur tí yvirtikið ogn og møguligar skyldir hjá Havnar Detailhandlarafelag, sum hervið er farið í søguni.

## Føroyska detailhandlarasøgan

Nevndin í Handilsvinnufelagnum er í løtuni í holt við at fyrireika sáttmála við rithøvund um at skriva føroyska detailhandlarasøguna, sum, eftir ætlan, kemur út í bók á heysti 2022. Limirnir í Handilsvinnufelagnum fara at verða meira kunnaðir um bókina, meðan hon verður skrivað. Møguliga liggja onkrir limir inni við myndum og øðrum áhugaverdum tilfari til bókina.

## Smápakkar úr Kina

Føroysk handilsvinna ynskir javnbjóðis kappingarfortreytir um føroysku kundarnar. Handilsvinnufelagið hevur tí heitt á landsstýrismannin í fíggjarmálum, um at leggja fyri Løgtingið uppskot til neyðugar lógarbroytingar í MVG- og tolllógini, soleiðis at føroysk og útlendsk handilsvinna fáa javnbjóðis kappingarfortreytir at virka undir á føroyska marknaðinum.

Handilsvinnufelagið má tíverri staðfesta, at higartil hevur landsstýrið og føroyskir politikarar als ongan áhuga havt fyri at gera nakað við hetta málið.

Handilsvinnufelagið hevur tó ikki slept málinum, og fer áhaldandi at arbeiða við hesum, til ein loysn er funnin á málinum.



## Atgongd til akfarsskránna

Handilsvinnufelagið hevur í fleiri ár arbeitt fyri, at bensinstøðirnar skuldu fáa talgilda atgongd til akfarsskránna hjá Akstovuni, tí tað hendir dagliga, at bilførarar gloyma at rinda rokningina, tá ið teir hava fylt brennievni á bilin í onkrari av bensinstøðunum kring landið.

Bensinstøðirnar máttu í hvørjum einstøkum føri senda teldubræv til Akstovuna fyri at finna fram til eigaran av bilinum, og tað tók vanliga fleiri dagar at avgreiða. Hetta var ein óneyðuga tung og ótíðarhóskandi umsiting í okkara talgilda samfelag, har møguleikar eru at geva vinnuni smidligari og lættari atgongd til talgildar upplýsingar.

Í fjør tók politiska skipanin grundgevingarnar hjá Handilsvinnufelagnum til eftirtektar, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði uppskot fyri Løgtingið, sum gevur bensinstøðunum talgilda atgongd til akfarsskránna.

Uppskotið varð samtykt, og nú hava bensinstøðirnar fingið talgilda atgongd til akfarsskránna á Akstovuni. Hetta málið er sostatt avgreitt frá Handilsvinnufelagnum.

## Pantskipan á einnýtisíløt

Í samgonguskjalinum stendur m.a. soleiðis: *“Fyri at fáa eitt grønari og burðardyggari samfelag er neyðugt, at borgarar og vinna samstarva. Vit skulu gera grønar orkuloysnir bíligari fyri brúkaran og seta í verk skipanir og lóggávu, ið minka um til dømis dálking og matoyðsl. Eisini eiga pantskipan og endurnýtsla at verða raðfest.”*

Handilsvinnufelagið hevur í fleiri ár arbeitt við eini felags pantskipan, har brúkarin sleppir av við øll síni endurnýtsluíløt á einum stað. Loysnin er ein einføld og smidlig pantskipan, sum er sergjørd til føroysk viðurskifti, og sum setur brúkaran og serliga umhvørvið í fremstu røð.

Handilsvinnufelagið fegnast tí um raðfestingarnar og orðingarnar í samgonguskjalinum, og at Umhvørvis- og vinnumálaráðið nú hevur sett ein arbeiðsbólk, sum skal koma við tilmæli um eina nýggja og dagførda pantskipan.

Handilsvinnufelagið tilnevndi í desember 2019 tveir limir í arbeiðsbólkin, men limirnir hava einki hoyrt aftur úr Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, hóast Handilsvinnufelagið fleiri ferðir hevur spurt Umhvørvis- og vinnumálaráðið, nær arbeiðið fer í gongd.

## Nýggjar reglur um vakmyndatól

Handilsvinnufelagið hevur eisini verið við til fyrireikingarnar av nýggju lógini um yvirvøku við vakmyndatóli, sum kom í gildi 1. januar í ár.

Nýggja løgtingslógin hevur reglur um, nær yvirvøka við vakmyndatóli kann fara fram og undir hvørjum treytum.

Dátueftirlitið hevur saman við Føroya Politi og Løgmansskrivstovuni gjørt eina vegleiðing um nýggju lógina, sum sæst á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið skal føra eina skrá yvir vakmyndatól, og tí skal tað fráboðast til Dátueftirlitið, tá vakmyndatól verða sett upp. Vakmyndatól, sum vóru sett upp áðrenn 1. januar 2021, skulu fráboðast av nýggjum í seinasta lagi 1. juli 2021.

Vakmyndatól skulu fráboðast á serligum fráboðanarskjali.

Talan er bert um skráseting av vakmyndatólum og ikki loyvi til at seta vakmyndatól upp, soleiðis sum reglurnar vóru fyrr, tá ið tað kravdist loyvi frá Dátueftirlitinum til uppsetan av vakmyndatóli.

Soleiðis er ikki longur. Nú er tað upp til hvønn einstakan, ið setir vakmyndatól upp, at halda ásetingarnar í nýggju lógini um vakmyndatól, men Dátueftirlitð skal tó framvegis føra skrá yvir vakmyndatól.

# Støðan nú og frameftir

Handilsvinnufelagið strembar alla tíðina eftir at fáa fleiri limir í felagið, tí málið hjá Handilsvinnufelagnum er at menna og styrkja føroysku handilsvinnuna, bæði úteftir og millum limirnar í felagnum.

Til at røkka málinum krevst eitt sterkt og sjónligt Handilsvinnufelag við nógvum limum.

Í løtuni eru 61 limir í Handilsvinnufelagnum, og tað er í minna lagi, um felagið skal kunna vísa seg sum eitt sterkt og sjónligt felag at umboða og verja áhugamálini hjá føroyskari handilsvinnu.

Handilsvinnufelagið hevur verið nógv tarnað av Korona seinasta árið, men komandi tíðina fer Handilsvinnufelagið at halda somu kós sum áðrenn Korona, har føroyska handilsvinnan alsamt verður gjørd meira sjónlig við marknaðarføring, sum varpar ljós á vinnuna, umframt skeiðum og øðrum tiltøkum fyri limir felagsins.

Handilsvinnufelagið fer framhaldandi at leggja stóran dent á at veita best møguliga tænastu og ráðgeving til limir sínar.

Einki mál er ov lítið og einki mál er ov stórt at venda sær til Handilsvinnufelagið við.

Um Handilsvinnufelagið ikki setir seg føran fyri at avgreiða ella loysa málið, so vísir felagið til rætta viðkomandi at taka sær av málinum.

Tað verður framvegis ein týdningarmikil uppgáva hjá Handilsvinnufelagnum at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum annars, soleiðis at føroysk handilsvinna fær best møguligar karmar at virka innanfyri.

Handilsvinnufelagið heldur tí eitt vakið eyga við lógaruppskotum og galdandi lógum og reglum fyri limir sínar. Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at føroysk handilsvinna hevur kappingarførar og smidligar karmar av virka innanfyri.



# Viðtøkur

## Viðtøkur handilsvinnufelagsins

**Kapittul 1**

**Navn, heimstaður og endamál**

**§ 1.** Navn felagsins er Handilsvinnufelagið. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2.** Endamál felagsins er at savna føroyska handilsvinnu í ein vinnufelgsskap at útinna felags áhugamál.

Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum karmum virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu, herundir.

- Menna og ávirka útbúgvingarskipanina fyri handilsvinnuna
- Betra um rekruttering av arbeiðsmegi til vinnugreinina
- Menna handilsvinnuna gjøgnum kunning og skeið
- Greina og vísa á týdningin av handilsvinnuni
- Ávirka og menna karmarnar fyri at reka handilsvinnu
- Hoyring av lóggávu
- Lobbyvirksemi

**Kapittul 2**

**Limaskapur**

**§ 3.** Í felagnum kunnu handilsfyritøkur gerast limir.

Umsókn um limaskap í felagnum verður send umsitingini av felagnum. Nevndin ger ásetingar fyri møguligar treytir fyri limaskapi.

Við innliming í felagið skrivar fyritøkan undir at halda lógir felagsins soleiðis, sum tær eru ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar.

Limur kann siga seg burturúr felagnum við 6 mánað freist.

Limur, sum ikki hevur greitt limagjald kann koyrast út úr felagnum. Henda útkoyring loysir tó ikki viðkomandi lim frá gjaldskyldu síni. Felagið kann krevja limagjald inn umvegis innheinting.

## Kapittul 3

## Limagjald

**§ 4.** Limagjaldið verður ásett á hvørjum ársaðalfundi, fyri eitt ár ísenn. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið.

Limagjaldið fellur til gjaldingar tann 1. mai á hvørjum ári. Tó skulu nýggir limir hava rindað limagjald fyri at fáa atkvøðurætt á aðalfundi sama ár sum innliman.

Felagsins inntøkur verða at nýta til rakstur, sum nevndin, ið stendur aðalfundinum til svars, heldur verða neyðugar. Skuldi felagnum verið tørvur á meiri peningi til at fremja ávís mál, hevur aðalfundurin heimild til at útvega neyðuga fígging við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin til útvegan av slíkum peningi leggja eykagjald á limirnar í hvørjum kalendaraári, tó ikki størri enn tað, ið svarar til tey vanligu limagjøldini.

## Kapittul 4

## Aðalfundurin

**§ 5.** Aðalfundur felagsins hevur hægsta ræðið í øllum viðurskiftum felagsins.

Rætt at koma á aðalfund hava allir limir felagsins.

Ein og hvør, sum hevur rætt til at koma á aðalfund, kann koma fyri annan við sama fundarrætti, um hesin limur hevur fingið fulltrú til tess. Limur kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

**§ 6.** Vanligur aðalfundur verður hildin á hvørjum ári í apríl mánað. Lýst verður til vanliga aðalfundin minst 14 dagar frammanundan. Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin og avger á hvønn hátt hann verður lýstur.

Á aðalfundinum er henda skrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Framløga av limalista
3. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári
4. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
5. Val av nevnd og tiltakslimum
6. Val av grannskoðara
7. Áseting av limagjaldi
8. Ymiskt

Allar avgerðir verða samtyktar við vanligum meiriluta. Atkvøðubýtið er ásett eftir starvsfólkatalinum hjá limunum soleiðis:

Limirnir hava eina atkvøðu fyri upp til 3 ársverk
millum 4 og 10 ársverk tvær atkvøður
millum 11 og 20 ársverk tríggjar atkvøður

millum 21 og 50 ársverk fýra atkvøður
fyritøkur við fleiri enn 51 ársverkum fimm atkvøður.

Atkvøðugreiðsla á aðalfundinum, ið viðvíkur lógarbroyting, kann bert verða samtykt við ¾ av atkvøðunum. Er fundurin ikki viðtøkuførur, kann verða lýst til nýggjan fund, og ræður tá vanligi meiriluti úrslitinum, uttan mun til fundarluttøku.

**§ 7.** Eykaaðalfundur verður at halda, tá í minsta lagi 2 nevndarlimir, ella minst ¼ av limunum skrivliga krevja tað. Lýst verður til eykaaðalfund á tann hátt og so langa tíð frammanundan, sum nevndin ger av.

**Kapittul 5**

**Nevndin**

**§ 8.** Felagið verður stjórnað av eini 3 ella 5 manna nevnd. Aðalfundurin velur annaðhvørt ár 1 ella 2 og annaðhvørt ár 2 ella 3 limir í nevnd felagsins, fyri 2 ár ísenn.

1 ella 2 tiltakslimir verða valdir á hvørjum aðalfundi.

Um nevndarlimur tekur seg úr nevndini í úrtíð, tekur fyrst valdi tiltakslimurin við nevndarsessinum.

Miðað verður eftir, at nevndarlimir og tiltakslimir umboða tær ymisku handilsgreinirnar og landið so væl sum tilber.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni beint eftir aðalfundin.

Nevndin hevur minst fýra nevndarfundir um árið.

Gerðabók verður førd frá nevndarfundum.

**Kapittul 6**

**Tekning/ábyrgd**

**§ 9.** Nevndarformaðurin teknar felagið. Nevndin hevur heimild at seta fólk til dagligu leiðslu felagsins, og kann veita slíkum umboðsfulltrú.

Til at upptaka lán, seta í veð, selja ella keypa fasta ogn krevst aðalfundarsamtykt og undirskrift á viðkomandi skjøl av nevndarformanni.

Felagið ábyrgdast bert við teirri til eina og hvørja tíð í felagnum verandi ogn. Í samband við virksemi felagsins, áliggur tað ikki limum og nevnd nøkur fíggjarlig ábyrgd.

**Kapittul 7**

**Grannskoðan**

**§ 10.** Roknskapur felagsins verður grannskoðaður av einum av aðalfundinum valdum grannskoðara.

Roknskaparárið er kalendaraárið.

Roknskapurin skal liggja til skjals á skrivstovu felagsins, tá lýst er til aðalfund.

**Kapittul 8**

**Avtøka av felagnum.**

**§ 11.** Felagið kann verða tikið av við ¾ av teimum greiddu atkvøðunum eftir samtykt av tveimum aðalfundum, og mugu í mesta lagi verða lidnir 14 dagar millum fundirnar.

Skuldi felagið verið tikið av, verða ognir felagsins nýttar, soleiðis sum aðalfundurin tekur avgerð um.

Samtyktar á eykaaðalfundi 02. juli 1997.
Broyttar á eykaaðalfundi 06. juni 2001.
Broyttar á eykaaðalfundi 24. august 2011.
Broyttar á eykaaðalfundi 1. mars 2016.
Broyttar á eykaaðalfundi 30. apríl 2019
Broyttar á aðalfundi 17. juni 2020.